Álit

í

løgtingsmáli nr. 36/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisskúlar og løgtingslóg um skúladepil í Marknagili (Avtaka kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð 7. november 2025 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Kommunufelagið, landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Undirvísingarstýrinum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Talan er um eitt gerðabýti, sum er gjørt í fullari semju millum land og kommunur.

Nú eldraøkið í aðrari lóggávu fær ábyrgdina av at veita alla tænastu til fólk við demens, verður hetta høvið eisini brúkt til at gera figgjarligu umsitingina hjá kommunum og landi einfaldari, soleiðis at land og kommunur ikki senda gjøld sínámillum, sum kunna verða javnað móti hvørjum øðrum. Tí verður kommunala gjaldið til yrkisskúlar tikið av, samstundis sum landið ikki skal rinda fyri tilboð til demenssjúk, sum kommunurnar nú yvirtaka sambært lóg.

Upphæddirnar, sum hava verið goldnar til hesi bæði økini, eru á leið tær somu, umleið 4,6 mió. kr. Fyri yrkisskúlarnar og kommunurnar merkir hetta, at umsitingin verður einfaldari á hesum økjum. Tað verður ikki neyðugt hjá skúlunum at gera upp, hvørjari kommunu teir einstøku lærlingarnir koma frá, og hvørjar rakstrarútreiðslur eru knýttar at hvørjum einstøkum lærlingi. Frameftir verður tað landskassin, sum rindar allar rakstrarútreiðslurnar.

Landsstýrið og Kommunufelagið eiga rós uppiborið fyri at loysa knútin á demensøkinum og at finna ein so smidligan figgingarleist, sum ger skipanirnar lættari, betri og bíligari at umsita.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 13. november 2025

Karlot Hergeirsson formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Hervør Pálsdóttir	Liljan Weihe	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	